

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 02 - 2013

# Thorskip hjálpir sjúklingi í Suðuratlantshavi

Manningin á føroyska frálandaskipinum Thor Assister fekk heldur sjáldsaman gest, tá skipið sigldi framvið fjarskotnu oynni Tristan da Cunha mitt í Suðuraratlantshavi í hesi vikuni. Gesturin var ein ungur breti, sum varð vorðin álvarsliga sjúkur og hevði biðið um flutning av oynni fyri at kunna koma undir køna læknahond. Bara Thorskip á leiðini Tað er ikki á hvørjum degi, at skip sigla framvið fjarskotnu oynni Tristan da Cunha mitt í Suðuratlantshavi. Men tað gjørdi eitt av frálandaskipunum hjá reiðarínum Thor í Hósvík nú um dagarnar, og til alla lukku fyri ein ungan breta, sum var stæddur á oynni og var vorðin álvarsliga sjúkur. Tá myndugleikarnir á Tristan da Cunha royndu at fáa samband við skip á leiðini visti tað seg, at bara eitt skip var nærhendis, nevniliga Thor Assister, sum var ávegis til Falklandsoyggjarnar, eftir at hava røkt uppgávur út fyri Walvis Bay í Namibia í Afrika. Tá myndugleikarnir á Tristan da Cunha bóðu føroyska skiparan á Thor Assister um hjálp vóru boðini, at hann fyrst mátti fáa góðkenning frá reiðaríinum og felagnum, sum teir skuldu arbeiða fyri við Falklandsoyggjarnar. Og boðini komu skjótt aftur til heilsumyndugleikarnar á oynni, og tey vóru, at Thor Assister vildi taka sjúka mannin við til Falklandsoyggjarnar, har hesin kann koma undir læknahond og helst sendast víðari til Bretlands. Ungi bretin og myndugleikarnir á Tristan da Cunha bera føroyska reiðarínum og manning tess stóra tøkk fyri at vilja hjálpa. Fyrsta skipið at koma framvið oynni, verður ikki har fyrr enn fyrst í mars mánaði. So tað var heppið, at Thor var á leiðini. Søgan sigur einki um, hvussu langa tíð tað tekur at sigla til Falklandsoyggjarnar. Heimasíðan hjá myndugleikunum á Tristan da Cunha, http - //www.tristandc.com skrivar m.a. soleiðis um hendingina - Head of Communications Andrea Repetto used the Island's AIS system and found a tug, the MV Thor Assister, on her way from Walvis Bay to the Falkland Islands. We made contact with the tug at 0330 on

7th February 2013. The Captain indicated that he'll slow down and wait off the Settlement until early morning, in order to get the patient's information from Dr Lesley Cupitt. We officially requested a medevac, and the Captain of the MV Thor Assister indicated that he'll need approval from the ship's owners, but also from the company that chartered the vessel for a project in the South Atlantic Ocean. They gave approval at 1130, and he was transport by factory barge to the MV Thor Assister. By 1200 they were on their way to the Falkland Islands. The young man expressed his sincere thanks to the Island and specifically his hosts on the Island, Simon and Natasha Glass, and the medical team of Tristan da Cunha for the treatment and support they gave him. A sincere gratitude to Thor Offshore Vessels and Petroleum Geo-Services for making the medevac a reality,  siga umboð fyri myndugleikarnar á fjarskotnu oynni Tristan da Cunha mitt í Suðuratlantshavi. Myndir Thor Assister í Havn Báturin, sum flutti sjúklingin umborð á Thor Assister